

# Etikk – kveikjanet

## Yvirskipað endamál

At skapa karmar fyri, at tryggja skipaða refleksjón á øllum arbeiðsplássum, har sjúkrarøktarfrøðingar starvast.

Vit etikk-kveikjaranetinum vil Sjúkrarøktaretiska ráðið virka fyri at tryggja sjúkrarøktarfrøðingum umstøður fyri skipaðari refleksjón. Hesar refleksjónir eru m.a. ein liður í fakligu menningini av hvørjum einstøkum sjúkrarøktarfrøðingi og ein máti at forða fyri at fólk verða útbrend. Harafturat eru refleksjónirnar við til at styrkja um fakliga og harvið etiska medvitið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum, sum er ein treyt fyri dygdargóðari røkt og umsorgan.

Etikk-kveikjaranetið er ein háttur at breiðka skipanina av sjúkrarøktaretiska Ráðnum, soleiðis at vit hava "Etikk-kveikjarar" úti á øllum arbeiðisplássum. Hesir skulu verða longdur armur hjá SER, sum SER eigur ábyrgdina av, gerast dugnaligari til uppgávuna.

Uppgávan er í høvuðsheitum at leiða skipaðar refleksjónir. Tað er ikki eitt krav, at skipaða refleksjónin skal snúgva seg um etikk. Heldur skal refleksjónin kunnu rúma tí, sum nú fyllir hjá einstaka starvsfólkinum ella í starvsfólkahópinum, og tann vegin koma etiskt truplar støður automatiskt upp. Tá er tað, at etikk-kveikjararnir skulu kunnu lofta hesum vandamálum og duga at fasilitera eina etiska greining av støðuni.

Allir limir kunnu framvegis skriva til Sjúkrarøktaretiska Ráðið, men tey kunnu eisini tosa við etikk-kveikjaran, sum møguliga megnar at hjálpa teimum at greina støðuna á staðnum.

Uppgávan hjá leiðarum er at tryggja karmarnar fyri, at tað ber til at hava skipaðar refleksjónir við jøvnum millumbili.

Hetta er ofta lættari sagt enn gjørt. Tí skipar SER fyri nøkrum verkstovum árliga fyri leiðarar og Etikk-kveikjarar, bæði saman og hvør sær. Endamálið við verkstovunum er partvíst at tryggja vitanardeiling, og partvíst at dugna partarnar, millum annað við at bjóða serfrøðingunum inn at halda upplegg ella fyrilestrar, sum vit kunnu arbeiða víðari við.

Uppgávan hjá SER er at verða til taks hjá Etikk-kveikjarunum og til at skipa fyri verkstovunum. Við at savna leiðarar regluliga, vóna vit at verða við til at skapa ein sterkan sjúkrarøktarfakligan leiðarafelagskap, sum megnar at standa saman um og tvíhalda um raðfestingina av skipaðum refleksjónum.



Sjúkrarøktaretiska Ráðið

September 2024